## Magnus útsligin

17 ára gamli Magnus Andreasen úr Runavík, sum skjeyt finaluumfør í innandura EM-kappingini í Kroatia, var seinnapartin í gjár útsligin. Tað eydnaðist honum at koma millum 16 teir bestu í bólkinum undir 18 ár, men í áttandapartsfinaluni tapti hann 114-118.



## Finalubrak á íslandsrossum

Seinnapartin í morgin, klokkan 17, verða finalurnar í sokallaðu Ford Cup-kappingini, sum Føroyskt Íslandsrossafelag skipar fyri. Finalurnar, sum tilsamans eru fýra í tali, verða í tølthøllini, og eru tær endin á einum kappingarári, har tvær innleiðandi kappingar hava verið fyrr í vetur. Kappast verður í fjórgongd og tølti, og lagt verður fyri við B-finalunum í báðum greinum. Har verður so kappast um at sleppa í A-finalurnar, sum verða aftaná. Føroyskt Íslandsrossafelag ger eitt sindur burtur úr stóra finaludegnum, tí kaffi- og matsøla er á staðnum, umframt at høllin verður pyntað.

# TB bjóðar SÍ av



Av teimum trimum ferðunum, SÍ og TB hava møtst í vetur, hevur TB vunnið tvær ferðir

Mynd: Hilmar Jan Hansen/ Einslistir

**Í vetur hevur SÍ bara tapt tveir dystir, og teir hava báðir verið ímóti TB, ið støðugt hevur tikið seg fram og nú rættiliga bjóðar av**


einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Kappingin í Eik-liguni hjá kvinnum hevur koyrt í einum og sama spori frá fyrstu løtu. Beinanvegin fór SÍ avstað, og síðani hevur tað bara verið ein spurningur um, hvat annað lið skuldi sleppa í finaluna. Fleiri hava ligið framvið, men tá avtornaði, var tað TB, ið kom stormandi fram og tók finalussessin.

At TB óivað eisini er tað av hinum liðunum, ið best er ført fyri at bjóða SÍ av, hava úrslitini í vetur víst. Og ikki minst tann sannroynd, at SÍ bara hevur tapt tveir dystir alt kappingarárið, og at tað báðar ferðir hevur verið ímóti júst TB.

Her stendur nógv upp á spæl, tí SÍ kann vinna triðja meistaraheitið á rað, meðan tað hjá TB kann gerast talan um at vinna tað fyrsta síðani 2002!

### Karin verður klár

Stóri spurningurin hjá SÍ hevur verið, um tað fór at eydnast Karini Mikkelsen at gerast klár til FM-finalurnar. Hon meiddi sær fótin beint undan steypafinaluni, men spældi kortini, eins og hon gjørdi tað, tá TB vitjaði í Sørvági.

– Jú, Karin er klár aftur og hevur vant við okkum hesa vikuna, og eisini allar hinar eru klárar. Nú hava vit verið nummar eitt í allan vetur, so eingin orsøk er at helma í, til alt er vunnið, sigur hevarin hjá SÍ, Annika á Stongum.

– Vit skulu hava góðar móttøkur, so vit fáa steðgað serliga Gudrid Nolsøe, ið servar væl hjá teimum. Fáa vit tikið væl ímóti, kann eg heva í allar ættir, tí vit hava gott álop um allan vøllin.

### Brúka breiddina

Hjá tvørakvinnum eru allar klárar uttan Bára Jacobsen, sum hevur fingið ein snudd og er ivasom. Men Gudrid Nolsøe heldur kortini breiddina vera tað berandi hjá liðnum.

– Vit skulu hava góðar servur og góðar móttøkur, umframt at vit skulu brúka ta góðu breiddina, vit hava, tí vit hava nógv gott fólk, sigur spælandi TB-venjarin.

– Nú hava vit vunnið tveir av trimum dystum ímóti SÍ, so tað skuldi sjálvandi givið okkum neyðuga sjálvsálitið undan finalunum. Tað ætla vit at taka við okkum og brúka.




Síðstu tríggjar ferðirnar, SÍ og Mjølnir hava spælt ímóti hvørjumøðrum, hevur SÍ vunnið

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# SÍ havt munin á Mjølnir

**Síðstu tríggjar ferðirnar hava menninir hjá SÍ vunnið á Mjølnir, men leygardagin og sunnudagin verður alt sett upp á spæl í FM-finalunum**


einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Ikki kann sigast annað, enn at tað eru tvey lið, sum kennast sera væl, ið hittast í mansfinalunum um føroyameistaraheitið í Eik-liguni, tí ikki færri enn sjey ferðir hava SÍ og Mjølnir staðið yvir av hvørjumøðrum í vetur – seks ferðir í landskappingini og so eisini í steypafinaluni fyri einum mánaði síðani.

At byrja við hevði Mjølnir munin, tí tvær tær fyrstu ferðirnar vunnu klaksvíkingar, og tí hava teir verið framman fyri sørvingar á stigatalvuni, líka til liðini hittust í Klaksvík leygardagin og SÍ við sigri slapp framum. Tað gav so sørvingum rætt til heimavøll í einum møguliga triðja finaludysti.

### Meira uppsettir

– Eg vil ikki siga, at vit í Mjølnir eru nervøsir, men heldur spentir. Gamaní, hava vit tapt tríggjar tær síðstu ferðirnar ímóti SÍ, men tað ger okkum bara enn meira uppsettar, sigur hevarin hjá Mjølnir, Thorvald Danielsen.

Hann sigur, at mestsum allir eru tøkir, men at teirra libero, Eyðstein Elttør, í vikuni hevur fingið ein skaða í lærið, sum ger hann ivasaman. Venjingin í kvøld skal vísa, um hann verður førur fyri at spæla um vikuskiftið.

– Vit skulu fyrst og fremst hava góðar móttøkur, og harnæst skulu vit royna at fáa blokkin at standa væl. Og so skulu vit sjálvandi royna at trýsta teir í servunum, sigur Thorvald.

### SÍ betri breidd

Nakað tað sama sigur libero-spælarin hjá SÍ, Johan Petur á Stongum, at teir ætla at gera, og hann heldur eisini, at SÍ hevur so mikið munin á Mjølnir, at tað væl eigur at bera til.

– Vit hava nógv betri breidd, og tað gevur okkum fleiri streingir at spæla uppá. Allir mans eru tøkir, so vit fara avstað við øllum okkara fólki, sigur Johan Petur.

– Hjá okkum ræður um at fáa móttøkurnar at koyra, so vit beinanvegin fáa trýst teir, tí vit hava eitt sera gott álop. Eisini ætla vit at trýsta teir við servunum, so teir ikki skulu sleppa í gongd.